# FÍGGJARLEIÐARI

## til Rúsdrekkasølu Landsins

Rúsdrekkasøla Landsins søkir eftir fíggjarleiðari. Landsfyritøkan hevur spennandi avbjóðingar og menningarmøguleikar fyri framman, og tú fært týðandi leiklut í strategisku framstigum okkara. Tú verður við í leiðslubólkinum og vísir beinleiðis til stjóran.

Fíggjardeildin hevur ábyrgd av øllum fíggjarviðurskiftum hjá Rúsdrekkasøluni. Deildin stendur fyri grundleggjandi uppgávum sum roknskapum, fíggjarætlanum, fíggjarstýring og frágreiðingum. Deildin hevur eisini um hendi tey krøv, sum áløgd eru landsfyritøkuni í sambandi við almenna fyrisiting.

RÚSDREKKASØLA LANDSINS

### Útbúgving og førleikar

- tú hevur leiðsluroyndir og royndir við at stýra eini fíggjardeild
- tú hevur hægri útbúgving í búskapi
- tú hevur hollar royndir við fíggjarstýring og fíggjarætlanum í Navision
- tú hevur innlit í viðkomandi lógir og reglugerðir
- tú dugir væl at samskifta munnliga og skrivliga

### Persónligir eginleikar

- tú hevur eitt skipað arbeiðslag
- tú vísir ábyrgd og hevur dirvi at taka avgerðir
- tú sýnir virkisfýsni og víðskygni
- tú dugir at raðfesta og at halda ásettar freistir
- tú hevur jaligan hugburð og ert liðspælari

Til rætta fólkið bjóða vit eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv á eini landsfyritøku, sum er í støguðari broyting. Tú fært sera góðar møguleikar fyri bæði fakligari og persónligari menning.

### Løn og setanartreytir

Starvið er flokkað sum deildarleiðari II eftir sáttmálanum hjá BLF og verður lønt eftir hesum. Starvið hevur eina royndartíð á 6 mánaðir.

### Umsóknir

Send tína umsókn við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum við teldubrævi til emo@rusan.fo ella við vanligum brævi til Rúsdrekkasølu Landsins, Postboks 3069, FO 110 Tórshavn, att: Elsa Maria Holm Olsen. Skriva frámerkið "Fíggjarleiðari" uttan á vanliga brævið.

Umsóknarfreistin er týsdagin 15. februar 2011 kl. 12.

SENDISTOVAN

# MENTANARLEIÐARI

## TIL RUNAVÍKAR KOMMUNU

Søkt verður eftir mentanarleiðara til Mentanardeildina, sum Runavíkar býráð hevur tikið avgerð um at seta á stovn, at taka sær av vaksandi talinum av málum innan mentanar- og skúlaøkið í kommununi.

Mentanardeildin, sum verður deild av býráðsumsitingini, hevur sum høvuðsuppgávu at vera fyrisiting hjá mentanarnevndini, sum fyrisitur mentanar- og skúlamál, sambært kommunustýrisskipanini hjá Runavíkar kommunu.









### STARVIÐ UMFATAR M.A.:

- Leiðslu á mentanar- og skúlaøkinum
- At vera umsiting hjá mentanarnevndini og hava fíggjarliga ábyrgd av virkisøkinum hjá mentanarnevndini
- At umsita tann partin av skúlalóggávuni, ið sambært lóg um fólkaskúla, frítíðarundirvísing, musikkskúla, bókasavn v.m. eru, ella verða, løgd til kommununa at umsita
- At samskifta við skúlar, stovnar, feløg og einstaklingar, sum virka á mentanar- og skúlaøkinum
- At umsita og samskipa skúlabarnakoyringina
- At hava umsitingarliga ábyrgd við stovnum og deildum, sum hoyra undir virkisøkið hjá mentanarnevndini
- At fyriskipa/samskipa vinarbýarsambond, hátíðarhald, móttøkur o.o. tiltøk, sum kommunan er vertur fyri
- At fyrireika nýggj tiltøk á mentanar- og skúlaøkinum

Starvið verður at seta 1. apríl 2011, ella eftir nærri avtalu.

### FØRLEIKAKRØV:

- Viðkomandi útbúgving og/ella royndir og kunnleika til økið
- Fyrisitingarligar royndir
- Munnligan og skrivligan málførleika
- Telduførleika á brúkarastøði
- Jalig/-ur, opin og fyrikomandi
- Leiðsluroyndir/-førleikar

Løn sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til borgarstjóran á telefon 41 70 00.

Starvið verður at seta 1. apríl 2011, ella eftir nærri avtalu.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 3. mars 2011.

Um ikki nóg nógvir skikkaðir umsøkjarar eru, skilar kommunan sær rætt til at søkja av nýggjum.

RUNAVÍKAR KOMMUNA

Boks 139, Heiðavegur 26, 600 Saltangará
Tel 41 70 00, runavik@runavik.fo
www.runavik.fo

KREA · TEL 60 80 80